## EG MEINI TAÐ

# Roykipolitikkur



*Niels Uni Dam skrivar:*

Eg var niðri í SMS í seinastu viku, saman við mínum tveimum synum, ein er 7 ár og hin 3 mánaðar. Komin uppá møtti eg einum pari. Hetta var eitt fitt ungt par 21-22 ára gomul, gentan var við barn, mundi hava gingið einar 5-6 mánaðar. Tey gingu har so fitt og spankuleraðu við hvør sínari sigarett.

Tað er jú sannroynd, at børn í móðurlívi hjá mammu, sum roykir, fáa ov lítla ilt í blóðið og vaksa tí seinni enn børn hjá mammum, sum ikki roykja, júst eins og tubbaksroykur hevur stóran part av skuldini í vøggudeyða, og elvir til krabbamein.

Tá eg sá hetta unga parið, stúrsaði eg við; hvat kann fáa ein roykjara at leggja av, um heilsan hjá børnum hansara ikki kann tað?

Royking er ein samfelagstrupulleiki, nógv størri enn onnur rúsevni. Ein stórur partur av fólkinum er so illa bitin av hesum heilsuskaðiliga vana, at tey seta sína heilsu og heilsuna hjá øðrum fram um teirra royk-rús.

Arbeitt verður kring allan heimin fyri, at tey sum velja ikki at roykja, ikki skulu noyðast at fáa royk í lunguni. Tankin aftan fyri roykipolitikkin er: Tú velur sjálvur at roykja, og tí eigur tað bert at ganga út yvir tína egnu heilsu.

Men í Føroyum verður einki gjørt. Her er SMS eitt ræðandi dømi. Einasta stað í øllum SMS, sum tey kalla roykfrítt, er eitt evarska lítið horn í Perluni. Hetta økið er umgyrt av roykjaraøkjum og kann tí neyvan kallast roykfrítt. Harafturat noyðist eg at ganga ígjøgnum roykjaraøkið við mínum nýføðingi fyri at sleppa inn har. Fyri at gera alt enn meira perfekt, so lata tey hetta økið aftur ein tíma áðrenn afturlatingartíð.

Eg royki ikki sjálvur og kenni tí ikki á mínum egna kroppi, hvussu bitin man kann gerast av hesum illaluktandi vana. Eg plagdi at roykja, men tað eru eini 21-22 ár síðan. Eg var smádrongur tá, og millum teir stóru steinarnar á Mikkjalsa bø sótu vit hvønn seinnapart og royktu smuglarasigarettir av onkrum eksotiskum uppruna. Vit lærdu ongantíð at anda roykin inn, og hildu tað smakka illa. Stutt eftir hetta funnu vit nøkur ónærislig bløð, sum nokk eisini vóru av smuglara uppruna. Í bløðunum fingu vit okkara uppreistrartørv nøktaðan og soleiðis endaði mín aktiva tíð sum roykjari.

Eg skrivi tí um royking sum passivur roykjari. Eg veit, at hetta fær nógvar av teimum meira áloypandi roykjarunum at síggja meg sum óegnaðan at úttala meg um royking. Hesir hugsa kanska, hatta er bara grenj. Enn ein ikki-roykjari sum skal hevda seg, og ikki hugsar um onnur enn seg sjálvan. Fyri mær kunnu tey roykja so nógv sum tey vilja, men eg vil sleppa undan at skula anda teirra royk niður í meg. Er tað ikki ein mannarættur?

Vikuskifti
Postboks 76, 110 Tórshavn, telefon 311820, telefax 314720,
teldupostur: turid@sosialurin.fo
Blaðstjórn: Turið Kjølbro

*Framhald av síðu 1*

annars kom klingur í valsin.

– Tá tú hevur eitt barn, kanst tú loyva tær at gera meira enn tá tú hevur trý so lítil børn, sigur Jónfríð.

– Men dreingirnir hava altíð verið lættir at fáast við, og tí hevur tað ikki verið so strævið, sum ein kundi væntað. Teir svóvu longu náttina út tá teir vóru tríggjar mánaðar gamlir. Um dagarnar fara teir í song um hálvgum átta tíðina, og klokkan sjey morgunin eftir noyðast vit at vakja teir.

Soleiðis er tað hvønn morgun, greiðir pápin okkum frá.

### Same procedure...

Hvønn morgun verður mestsum eitt ritual gjøgnumført. Upp klokkan gott sjey, og dreingirnir verða vaktir. Meðan mamman skiftir teimum, og letur teir í, fer pápin niðurundir at gera morgunmatin kláran. Tá klokkan er átta koma mamma og børn niðurundir, og babba fer til arbeiðis, at smíða, og tá stendur morgunmaturin klárur á borðinum.

– Um morgunmaturin ikki stendur klárur á borðinum, tá eg komi niðurundir, ella um ein av dreingjunum stoytir vatn á seg og noyðist at skifta klæðir, so verði eg ov sein til arbeiðis, sigur Jónfríð, sum arbeiðir á Fiskavirking í Runavík.

Jónfríð arbeiðir 3/4 tíð á Fiskavirking í Runavík, og meðan eru dreingirnir í vøggustovu í Fuglafirði, sum teimum dámar ógvuliga væl.

Tá Teodor, Birgir og Tórður vóru gott hálvt annað ár, dugdu teir longu væl at tosa, og tað hevur gjørt tað nógv lættari hjá bæði foreldrum og starvsfólkunum í barnagarðinum at taka sær av teimum.

– Teir eru glaðir fyri at vera í barnagarði, fortelur Dia. – Ongin trupulleiki. Tær ferðirnar eg havi verið teimum, so koma vit inn, lata teir úr, ein muss og so er tað farvæl og teir fara inn. Teir koma ikki eingongd rennandi yvir til hurðina aftaná okkum.

### So líkir, men tó

Teir eru tríggir, teir líkjast, men allíkavæl, so er tað ein, sum ikki rættiliga líkist hinum báðum. Hetta kemur av, at Birgir og Tórður eru eineggjaðir.

– Teir líkjast allir sjálvsagt, men teir eru hóast alt heilt ymiskir.

Birgir og Tórður halda eitt sindur meira saman, meðan Teodor heldur seg eitt sindur fyri seg sjálvan, og fjasar og roksar einsamallur.



*Teknikarin Teodor*



*Tórður*



*Birgir*

– Teodor er tann heilt tekniski. Hann er púra burtur í øllum, sum hevur knappar at trýsta á. Longu nú dugir hann at tendra útvarpið, seta ta fløguna frá hann vil hoyra, tendra sjónvarpið, skifta videoband og so framvegis, meðan tað klára hinir báðir als ikki.

Og nú Teodor hevur hoyrt, hvat prátið fór at snúgva seg um, sníkir hann seg innar í stovuna og setur Bassa-fløguna frá, so tað rungar eftir í øllum húsinum.

– Tá teir eru í bað, er tað Teodor, sum fyllir sproyturnar við vatni, meðan hinir báðir sproyta. Birgir og Tórður finna ikki rættiliga útav hesum teknikkinum enn.

Munur er á teimum. Teodor er meira friðarligur, meðan hinir kanska eru eitt sindur meira buldrasligir.

– Teodor er klossutur, hann dettur ofta. Tá hann var lítil gekk tað long tíð áðrenn hann kláraði at halda høvdinum uppi sjálvur, og vit væntaðu, at hann fór at vera sindur seinur á veg, men tað vísti seg at verða púra øvugt.

Hann var tann fyrsti, sum gekk framvið, sigur Dia.

– Hann er eitt ordiligt slangumenniskja. Tað kann knútur koma á hann, so bleytur og liðiligur er hann. Hann smekkar altíð pannuna í.

Jónfríð og Dia greiða okkum frá, at teir halda altíð saman, og eru skjótir at verja hvønn annan um onkur roynir at "leypa á" ella skelda.

### Føðingardagur

Seinasta leygardag fyltu dreingirnir so trý ár, og vit hava frætt, at hetta var eitt stórt rok. Yvir 60 fólk vóru í føðingardag og soleiðis er tað á hvørjum ári.

– Tá klokkan var farin av trý, so koyrdi tað bara frameftir inntil á midnátt, og tú kanst ímynda tær, at vit vóru móð tá dagurin var yvirstaðin.

Men dreingirnir hava tað gott. Teir tosa, flenna, gráta, klandrast, spæla, renna, spæla bólt og alt annað, júst sum onnur børn.

At enda kundu vit nevnt, at nøvnini hjá teimum eru eftir ommum og abbum. Tórður eitur eftir mammu Dia, sum eitur Tórjun, og Teodor eftir pápa Dia, Theodor. Birgir hevur fingið navnið frá Birgit ommu, sum er mamma Jónfríð.

– Vit vildu ikki hava, at teir itu onkur nøvn, sum líktust ov nógv, sum til dømis, Rúni, Rani og Rói. Men hóast alt, so hava teir allir seks bókstavir og enda við r, so okkurt hava teir til felags, sigur Dia.

Men nú er vorðið seint. Dreingirnir eru vorðnir eitt sindur friðarligari. Kanska er tað tí Pocahontas er á skránni. Tað syrgdi Teodor fyri at fortelja okkum, og tendraði sjónvarpið júst klokkan 18.30, tí tá var stóri pinnur komin niður á seks talið. Útsenda og myndamaður takka fyri seg, og meðan Pocahontas ljómar í bakgrundini gongur leiðin aftur út á Argjar.



Hugspor um reiðmentan II:

# Ikki sum at seta seg í bil

**At hava hest, at vera reiðmaður, er nakað, ið tekur tíð. Men eisini nakað, ið ein hevur stuttleika av. Og samanhaldið og felagsandin eru í hásæti, siga tveir av reiðmonnunum í Havn, ið teljast millum teir royndu í eldra ættarliðnum**



REIÐMENTAN

*Dagfinn Olsen*
*Myndir: Jan Muller*

Fyri viku síðani høvdu vit prát við Heðin Samuelsen um reiðmentan, í sambandi við, at hann á 65 ára føðingardegi sínum beyð reiðmonnum til sermerktan dag, har ross og ríðing var á skránni. Greitt var frá um ítrivið, ið so mong hava eina meting um, men sum so fá veruliga kenna nakað stórvegis til.

Fleiri av gomlu, garvaðu reiðmonnunum møttu upp, tá 43 ross savnaðust í túninum hjá Heðini, m.a. Poul og Høgni Mohr og Viljormur Tórsheim og Aksel Hansen.

Vit hava fingið orð á hesar síðst nevndu, fyri at fáa teir at líta aftur um bak — og fram eftir — og at lýsa hesa mentan, henda felagsskap, sum teir sum royndir reiðmenn síggja hetta fyribrigdi.



*Viljormur Tórsheim og Aksel Hansen*

### Arvur

Bæði Aksel Hansen og Viljormur Tórsheim siga, at tað er arvur, ið ger, at teir fáast við ross.

- Tað hevur altíð merkt nógv at koma í fjøllini. Líka síðani eg var smádrongur. At koma út í náttúruna hevur alt at siga. Ofta er tað í familjum og so arvast áhugin, sigur Aksel Hansen.

Og Viljormur Tórsheim er samdur.

- Tað er arvaliga belastað. Eg eri uppvaksin við hestum. Yngra ættarliðið hevur hetta eisini sum ítriv, men tað er stór ábyrgd at hava hest, ið skal passast morgun og kvøld, sigur Viljormur Tórsheim.

Men báðir eru teir samdir um, at hetta er eitt ítriv, sum ein hevur stuttleika av, hóast tað er sera bundið og stór ábyrgd fylgir við.

- Ein hestur skal motiónerast. Tað blívur eitt samband millum mann og hest, nakað kensluborið. Sum at hava hund, sigur Viljormur.

- Menn eru eisini farnir at dyrka gonguløg. Men at ríða runt á sløttum er ikki eg, eg vil heldur út í náttúruna, sigur Viljormur og leggur afturat, at tað líkasum eru tvær metingar um ríðingina; tey, ið dyrka gonguløgini og tey, ið heldur vilja út í náttúruna og upp á fjøllini.

### Út við hestinum — inn við sjeikinum

Tað merkist á prátinum við garvaðu reiðmenninar, at hetta eru sálarliga frískir menn, ið sera fegnir práta um sítt ítriv, ið kanska eisini er ein lívsstílur.

Og fegnir eru teir báðir um, at yngri kreftir tykjast taka við og at áhugin er vaksandi.

- Nógv ung eru komin við og Berghestar geva eisini fólki møguleika at ríða. Tó tykist, sum eru fleiri gentur, enn dreingir, ið koma til, sigur Aksel.

- Ofta eru tað ungar gentur, ið vilja hava hest. Og tær eru óførar at passa hestarnar, ofta tíma tær betri, enn vit, ið eldri eru. Men so gerast tær eldri, og so hendur tað seg, at tær "siga út við hestinum og inn við sjeikinum", sigur Viljormur skemtiliga.

- Men yngra ættarliðið gongur høgt uppí tað og felagsskapurin er góður, sigur Viljormur, ið leggur afturat, at her er ikki munur á monnum, hóast teir koma úr øllum ættum, eisini samfelagsliga sæð.

- Reiðmenn koma væl útav tí saman. Teir koma saman um hetta, ofta koma teir ikki saman í tí dagliga. Teir kunnu vera stingandi og bersøgnir, men einki ilt býr undir, sigur Aksel.

Og Viljormur er samdur, og leggur dent á, at eisini er talan um eitt sera skemtingarsamt fólkaslag.

### Halda á

Hóast bæði Viljormur og Aksel eru í sjeytiárunum, so er hugurin enn til ross og ríðing.

Men nær gevst ein reiðmaður?

- Eg havi ikki riðið í eitt ár, men havi ætlað at fara avstað aftur, sigur Aksel, ið er 78 ár og hevur merkt, at heilsan spælir avgerandi leiklut hesum viðvíkjandi.

- Men í Íslandi ríða menn. Eg veit um ein, ið eru yvir 90 ár. Men í Íslandi er lendið eisini øðrvísi, sigur Aksel.

- Tað er sera ymiskt. Tað er, sum heilsan er. Tá ein er í sjeytiárunum, er ein ikki ungur longur. Men tað er víst, at tað er ikki sum at seta seg í bil, at fara á hestbak, tað krevur sítt, leggur Viljormur dent á, men enn hevur hann tó ikki rættiliga hugsað um at leggja frá sær.

- Tey yngru taka við, so hesturin fær motión, um eg ikki fari, sigur Viljormur.

Báðir eru teir samdir um, at reiðmenn hava stuttleika av sínum ítrivi, ið altso í stóran mun gongur í arv, men sum tó tykist stevna ímóti bjartari framtíð, tí áhugin er vaksandi millum tey yngru.